**(Uppskot til)**

# Kunngerð

**um**

**søvn og bókasøvn landsins**

Við heimild í § 17 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Endamálið við kunngerðini er at tryggja søvnum og bókasøvnum landsins at gera eintøk av vardum verkum, í tann mun tað er neyðugt í teirra virksemi.

*Stk. 2.* Hesi skjalasøvn, bókasøvn og søvn (hereftir nevnd søvnini) kunnu framleiða eintøk av vardum verkum, ljóð- og myndaupptøkum, fotomyndum og skráum, uttan samtykki frá rættindahavarum:

1) lands- og kommunal skjalasøvn,
2) almenn bókasøvn og onnur bókasøvn, ið eru heilt ella lutvíst fíggjað av tí almenna,
3) søvn, ið eru góðkend við lóg og
4) onnur skjalasøvn, bókasøvn og søvn, sum Mentamálaráðið, í hvørjum einstøkum føri, metir skynsamt at javnseta við omanfyrinevndu.

*Stk. 3.* Rætturin til at gera eintøk er treytaður av, at framleiðslan er neyðug í virksemi savnsins og at treytirnar niðanfyri eru loknar.

*Framleiðsla av eintøkum við varðveiting fyri eyga*

**§ 2.** Loyvt er at gera eintøk av verkum, sum stovnarnir hava í søvnum sínum, um tað er neyðugt av varðveitingar- ella trygdarávum. Henda áseting fevnir eisini um eintøk, sum eru framleidd við heimild í §§ 3-5 í hesi kunngerð.

*Fullfíggjan av skaddum verkum*

**§ 3.** Verður eitt eintak av einum verki ella samliverki ófullfíggjað, kunnu stovnarnir gera eintøk av vantandi pørtunum. Tó bert um hesir partar eru lítlir í vavi í mun til sjálvt verkið, og endurútvegan av verkinum ikki er gjørlig í vanligum handli, hjá útgevara ella forlagi.

*Framleiðsla av eintøkum sum uppískoyti til savnið*

**§ 4.** Vísindalig og faklig bókasøvn, sum virka sum fróðskaparsetursbókasavn ella høvuðsbókasøvn fyri eitt ávíst yrkisøki, kunnu framleiða eintøk av útgivnum verkum, ljóð- og myndaupptøkum, fotomyndum og skráum v.m., sum eiga at vera til taks á savni stovnsins. Tó bert um endurútvegan ikki er gjørlig í vanligum handli, hjá útgevara ella forlagi. Stovnurin kann bert gera eitt eintak.

**§ 5.** Sambært § 1, er loyvt at gera eintøk av verkum í dátugrunnum í tann mun teir fella inn undir virksiøkið í § 25, stk. 3, í løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005.

*Fremleiðsla av eintøkum til granskingarendamál*

**§ 6.** Ein stovnur kann framleiða einstøk eintøk av tilfari í savni sínum:

1) til granskingarendamál,
2) til at flýggja út til aðrar brúkarar, tá ið talan bert er um einstakar greinar úr samliverki, tíðindablaði ella øðrum blaði, tíðarriti, ella styttri brot úr bók ella øðrum skrivligum bókaverki og
3) fyri at læna út, tá stovnurin metir, at tað ikki vera ráðiligt at læna upprunaeintakið út, vegna tess serliga virði, sjáldsemi ella ringa haldføri.

*Stk. 2.* Brúkarin kann bert fáa *eitt* eintak til taks.

*Stk. 3.* Uttan mun til stk. 1 og 2, kunnu eintøk av ikki-almannakunngjørdum verkum, ið eru latin stovnunum við avtalu

ella testamenti, bert framleiðast, um mett verður, at annað ikki var ætlað, tá eintakið varð latið savninum í varðveitslu.

**§ 7.** Talgild eintøk, ið eru framleidd eftir hesi kunngerð, kunnu bert nýtast av einstaklingum til persónliga skoðan og nám á telduskíggja og avspæling á tí stovni, har eintakið varð framleitt. Tó er loyvt at útflýggja eintøk í pappírsformi til einstaklingar í samsvar við § 6.

**§ 8.** Rætturin at framleiða eintøk eftir hesi kunngerð, fevnir ikki um talgild edv-forrit.
*Stk. 2.* Henda kunngerð avmarkar annars ikki heimildina til at framleiða eintøk eftir upphavsrættarlógini. Hetta fevnir eisini um atgongdina hjá brúkarunum at framleiða eintøk ella lata framleiða eintøk av tilfari úr savninum til privata nýtslu, eftir § 16 í løgtingslóg um upphavsrætt.

*Rættarverja*

**§ 9.** Brot á ásetingarnar í hesi kunngerð, er samstundis brot á § 3 í løgtingslóg um upphavsrætt, sum kann hava við sær revsing, krav um endurgjald og samsýning, eftir ásetingunum í kap. 8 í lógini. Mentamálaráðharrin kann í slíkum førum, taka rættin at framleiða eintøk frá tí stovni, ið hevur ábyrgdina fyri brotinum á reglurnar í hesi kunngerð.

*Gildiskoma*

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Mentamálaráðið, XX.XX.2013

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Lógarteksturin:
**§ 17.** Landsstýrismaður ásetir í kunngerð neyvari reglur um, nær, hvar og hvussu vard verk kunnu nýtast í frálæruhøpi, innanhýsis í stovnum og virkjum, á sjúkrahúsi o.l., í søvnum landsins og til sjón- og hoyriveik.